LEYSASØLA:
50 oyru

# SOSIALURIN

FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐRALAG

Nr. 80
MIKUDAGIN
13. OKTOBER 1965
38. ÁRG.



TRÝBURÐIRNIR ÚR DALI. Henda myndin, tikin mánadagin á Landssjúkrahúsinum — sýnir trýburðirnar 4 dagar gamlar saman við mammuni Judith Nolsoe.

# Spirituskoyring ein hótti

**Ikki bert í útlondum, men eisini her heima er spirituskoyring eitt brot á ferðslulógina, sum er í óhugnaligum vøkstri.**

Landsrætturin var seinasta mánaða settur í Havn. Fútin hevur sent bløðunum ein úrskurð av teimum málum, sum komu fyri. Av teimum skilst, at sakirnar, sum rætturin hevði til viðgerðar fyri ein stóran part snúgva seg um brot á ferðslulógina.

Tað man vera almannakunnugt, at spirituskoyring, í alt ov nógvum førum er ein hótti. Og serliga vandamikil, tá tað ikki umberst, at tað ofta førir við sær, at saklEyst fólk kemur illa fyri.

**Og tað eru øll tekin til, at spiritusnýtsla í samband við koyring við motorakførum er vaksandi og í dag er vorðin tvífalt so stór, sum hon var bert fyri ári síðani, her hjá okkum.**

**NANSY S** fór úr Grønlandi fyrrakvøldið við útróðramonnum úr Borgshavn. Við eru 7 bátar, meðan einir 14 standa eftir haryviri í vetur.

**KOMMUNUVAL** hava verið í Eysturtýsklandi, luttøkan sigst hava verið ófør, meira 99 pst. men hartil er at siga, at bert ein listi er loyvdur.

## Hittinorð góvu tilfar til eina bók

Tað er kvinnuni í holdið borið, at finna fram brekini hjá tí gávuríka og klóka manninum eins og fyrimunir dárans. Hesi gomlu vísdómsorð hjá Honoré de Balzac fann íspegilin Breinholst ein dag á skrivaraborðið sínum aftaná eyðmjúkt at hava funnist at konu síni, sum altíð fanst at honum, men ongantíð gav honum rós.

Hetta fekk Breinholst til at skriva nýggju bók sína »Min kones mand« sum ikki letur nakran í iva um, hvussu hann hereftir eigur at vera mettur sum hjúnarfelagi og húsbóndi.

So dámligt er hansara ummæli av hjúnarlagnum í hansara nýggju bók, at ein til fullnar skilir, at hansara bøkur koma út í øllum vestureuropeiskum londum, og so langt burtur sum í Australia og Suðurameriku.

»Min kones mand« er skrýdd við hópin av myndum av Léon, sum tvær ferðir í ár hevur vunnið 2 virðislønir í tekning.

Tað er Wangels forlag sum hevur givið bókina út. Bókin er 188 blaðsíður til støddar.



ÚR BÝRÁÐNUM

# Skógfúti til plantasjuna

**SAMRÁÐINGAR VIÐ JARÐARRÁÐIÐ — MEIRA AV HAVNARÁ UNDIR LOK — INNSTILLAN AV VARASKÚLASTJÓRA — OGNARTØKA NIÐRI Á SANDI**

Hóskvøldið 7. oktober var fundur. Allir limir møttir, 29 mál vóru á daggsskránni og eydnaðist at fáa alt liðugt beint áðrenn kl. 24. Tvey mál vórðu tikin aftur, nevniliga bræv frá barnaverndarnevndini viðv. ungfólki, ið vitjar umborð á skip (beint í havnanevndina) og skriv frá pf. Tórshavnar Trolarafelag viðv. partapeningateknan (beint í kassanevndina).

**FRÁ KASSANEVNDINI**
vóru tilráðingarnar hesar:

1. Bræv frá jarðaráðnum viðv. Marknagilsvegin. Nevndin havt fund við Karsten Rasmussen (Jarðarráðið) og Tr. Samuelsen, sakførari býráðsins, hevði verið til steðar. Samtykt varð, at býarverkfrøðingurin og matrikulskrivstovan skulu gera eitt skitsuprojekt áðrenn 1. nov í ár.
2. Bræv frá Jarðarráðnum viðv. traðum millum Sundsvegin, Oyggjarvegin og Varðagøtu. Hetta var viðgjørt á sama fundi, og samtykti býráðið at lata gera býarplan yvir økið at vera lidnan innan 1 ár og samstundis varð byggistopp sett her.
3. Mál viðv. Ternuryggi. Ætlanin er at kommunan skal keypa Ternurygg, men fyrst varð samtykt at gera plan yvir økið (áðrenn 1. nov. 1967).
4. Bræv frá Tórshavnar uttanbiggja kommunu um loyvi at koyra rusk á sjógv yviri við Strond. Sýtt, kommunan má fyrst fáa sínu egnu renovatións viðurskifti í ordan, síðan kann komast aftur til málið.
5. Bræv frá Ólafi Gudmundsson viðv. parkering í Vágsbotni, klagar yvir at bátar standa á koyrivegnum. Nevndin hevði samtykt at senda fútanum hetta aftur við tí, at ferðslan hoyrir undir politinum. J. P. Henriksen meinti, at hetta var ov veikt, skuldi skoytast uppí, at hetta var uppgávan hjá fútanum at fáa í rættlag. Samtykt.
6. Umsókn frá Ebenezer um loyvi at seta 2 hátalarar upp uttan fyri samkomuhúsi teirra at nýta til gøtumøti. Sent fúanum aftur, tí upplýst varð av Ebba Mortensen, at á Ólavsøku hevði samkoman hátalarar uppi og býráðið var ikki eftirspurt, sostatt mátti fútin vita betur beskeð um hetta og tí vildi E. M. at tað var kommunan sum spurdi embætismenn um hetta og ikki øvugt.
7. Bræv frá plantasjunevndini um kloakkviðurskiftini í plantasjuni. Undir hesum varð upplýst at søkjast skuldi í donsk-

(Framhald á 3. síðu)

**Mánadagin legði nýggja norska stjórnin fram fíggjarlógaruppskotið á stórtingi. Uppskotið er uppá 12 milliardir 382 miljónir krónur, tað er 5,3 pst. hægri enn seinasta ár.**

## 5 daga skúlavika

Nógv hevur verið talað um at stytta skúlavikuna hjá børnunum. Men ikki hevur semja verið — tó í Noregi hava teir roynt hetta, ein skúli í Oslo hevur síðan skúlaárið byrjaði aftur roynt 5 daga skúlaviku, og hava allir partar verið væl nøgdir. Samstundis sum hinir dagarnir verða longri, so eru tímarnir í skúlanum 40 min. ístaðin fyri 45 frammanundan. Í mai avgjørdi norska skúlastjórnin at seta hesa roynd í verk. Ein atkvøða fór fram millum foreldur at børnunum og vóru 82 pst. fyri, 9 ímóti meðan restin ikki tók støðu.

Bæði lærarar, foreldur og børn siga seg vera væl nøgd við skipanina.

## William Smith 55 ár



Tann 13. oktober fyllir William Smith fyrrv. løgtingsmaður úr Vági 55 ár. Tað eru nú brátt 15 ár umliðin, síðan William legði frá sær sum tingmaður, eftir at hann sum tingmaður javnaðarmanna hevði starvast á tingi í 6 ár. Hetta vóru ikki tey léttastu 6 árini, har av tey 2 vóru meðan veraldarbardagin enn leikaði á. Og ikki lá tingarbeiði Williams eftir tey seinastu 4 árini av tingskeiði hansara aftaná kríggslok. Tí sum formaður í ymsum tingnevndum varð nógv arbeiði lagt á herðar hansara — bæði skrivliga og munnliga. Undir formannsskapi William í Løgtingsins fiskivinnunevnd varð »Lønjavningargrunnur skipsfiskimanna« settur á stovn. Í uppskotinum til lóg um henda grunn átti William hvønn stav og hvørt tal. Tá leikaði hart

(Framhald á 3. síðu)

**Tveir jarðskjálvtar vóru fyrst í vikuni í Jugoslaviu, í býnum Skoplje sum fyri fáum árum síðan var sundursorlaður av jarðskjálvta. Hesaferð var tó eingin vandi á ferð**



**26. sept. í ár vitjaði amerikanska sendifrúgvin í Danmark, mrs. Elkus White, Klakksvík, har hon fegin vildi síggja skúlan og vera við til ein undirvísngartíma.**
**Tá hon kom í skúlagarðin stóðu øll skúlabørnini við lærarum vakurt uppstillað, og har helt hon stutta røðu, áður enn farið varð í skúlastovuna við 3. flokki í realdeildini, har Meinhard Johansen, varaskúlastjóri, undirvísti í enskum**
**Á myndini síggja vit mrs. Elkus White, sendifrúu við lærarab orðið, Meinhard Johansen, varaskúlastjóra og Hákun Djurhuus, løgmann, ið var við á ferðini.**